## Arbeiðsmegi úr ES

Tey seinastu árini hava rættiliga nógvar norðurnorskar fyritøkur brúkt arbeiðsmegi úr ES-londum, og tað fer at halda fram. Ein spurnarkanning vísir, at 26 prosent av fyritøkunum í Troms hava brúkt ES-arbeiðsmegi tað seinasta árið, og 35 prosent av teimum spurdu fyritøkunum siga, at tær fara ivaleyst at leita eftir arbeiðsmegi úr einum ella fleiri ES-londum í ár. Kanningin av viðurskiftunum í Norðurnoregi samsvarar rættiliga væl við støðuna í Noregi sum heild, tí 28 prosent av fyritøkunum í Noregu brúktu ES-arbeiðsmegi í fjør, skrivar Aftenposten.



## Sjóverjuskip skaða í Kili

Alt bendir á, at eitt skip, sum íslendska sjóverjan letur byggja í Kili, fekk rættiliga stóran skaða í jarðskjálvtanum seinasta leygarmorgun. Sjóverjan sigur, at ein hálvan triða metur høg flóðalda rakti skipasmiðjuna. Sjógvurin fossaði inn í turrdokkina, har skipið stóð, tók stabbarnar undan skipinum, so tað legði seg eini 30 stig. Úrslitið var, at sjógvur kom í maskinrúmið, og tað er eitt álvarsmál, sigur sjóverjan. Harafturat fekk skipasmiðjan skaða, so tað er óvist, nær hon kemur aftur í gongd av álvara. Men nýggja sjóverjuskipið (myndin) kemur so ikki til Íslands í juni, sum ætlanin var.

# Leirvíkingar steingja nú Norðoya-tunnilin



*Býráðið í Eysturkommunu krevur nú, at vegurin til og frá Norðoyatunlinum alt fyri eitt verður grivin upp aftur og sáddur við grasið, so at lendið verður latið kommununi aftur í sama standi, sum tað varð latið til vegin*

**Eysturkommunan hevur nú mist tolið við samgonguni og krevur nú, at vegurin í sambandi til Norðoyatunnilin alt fyri eitt verður lagdur undir mold og sáddur við grasi**

NORÐOYATUNNILIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skal vegurin til og frá Norðoyatunlinum kappast av, so at tað ikki longur verður koyrandi ígjøgnum tunnilin.

Tað hevur býráðið í Eysturkommunu nú samtykt.

Og tað skal vera beinanvegin, at vegurin verður kappaður av.

Tað er fult semja í býráðnum um at nú er nóg mikið drálað málinum um vegaføringina ígjøgnum Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin.

Tí er full semja í býráðnum um, at loyvið at binda vegin til og frá Norðoyatunlinum í tann kommunala vegin í Leirvík, verður ikki endurnýggjað.

Tað gekk út á nýggjárinum og býráðið noktar sostatt at endurnýggja tað einaferð afturat.

### Vegurin gravast upp

Men býráðið hevur harafturat kravt, at vegurin til og frá tunlinum alt fyri eitt verður grivin upp aftur og sáddur við grasi so at lendið kann latast kommununi aftur í sama standi, sum tað varð latið til vegin.

Her er talan um tann partin av vegnum, sum ikki skal brúkast til nýggjan veg eftir løgtingslógini um vegaføring ígjøgnum Leirvík og sum sostatt kemur at liggja um ein blindgøgn.

Tað er kommunan ikki áhugað í og sostatt verður kravt, at vegurin verður grivin upp og sáddur og latin kommununi aftur.

Og hetta skal verða beinanvegin, leggur býráðið dent á.

Tað er vanligt, at eitt lendið skal latast kommununi aftur í sama standi, sum tað er í, táð ið tað verður latið, so tað er onki undarligt í hesum, sigur borgarstjórin.

### Norðoyartunnilin steingjast

Hetta er ein avgerð, sum í veruleikanum hevur við sær, at Norðoyatunnilin verður stongdur.

Og tað er Jóhan Christiansen, borgarstjóri í Eysturkommunu, fullgreiður yvir.

- Hetta er eitt krav, sum førir við sær, at Norðoyatunnilin verður stongdur.

Hin møguleikin er sjálvandi, at Løgtingið samtykkir eina serliga lóg, ásetir íbindingina við lóg og sum sostatt forðar fyri at kommunan fær lendið aftur.

Men tað er at gera seg inn á kommunala sjálvræðið og tað er so mikið alvorligt, at spurningurin er um Løgtingið vil tað.

Borgarstjórin sigur, at tað er við vilja, at býráðið ikki hevur sett nakra tíðarfreist á.

- Men vit hava lagt lagt dent á, at tað skal vera beinanvegin.

Hann leggur dent á, at hetta er ikki meint sum ein provokatión, men at býráðið hvur fullan rætt at krevja økið aftur, tí talan er um kommunalt øki.

### Skal vera beinanvegin

Hann sigur, at býráðið hevur nú fullkomiliga mist tolið við landsins myndugleikum.

Hinvegin stendur hurðin framvegis opin fyri at finna eina semju.

- Vil Løgtingið eina semju í málinum, eru vit sjálvandi sinnað til tað, sigur Jóhan Christiansen.

- Vit skulu nokk geva teimum tað skoðbrá, sum er neyðugt at finna eina loysn. Men tað krevur, at vit fáa eitt útspæl beinanvegin.

- Kemur eitt útspæl frá landsins politiska myndugleika, er býráðið sjálvandi sinnað at taka tað til eftirtektar og sleppa kravinum um at vegurin verður kappaður av.

Men hann leggur dent á, at tað krevur eina skjóta avgerð í landsstýrinum.

- Tað skal vera beinanvegin, at landsstýrið tekur stig til at finna eina loysn á málinum, tí tað hevur bíðað alt ov leingi, sigur hann.

Annars hevur ligið í kortunum, at vegurin skuldi heldur ikki gerast í ár, tí peningur er ikki settur av á fíggjarlógini til endamálið.

Men borgarstjórin ger púra greitt, at tað verður ikki góðtikið, at ein loysn skal bíða til næsta ár, ella kanska enn longri.

- Ein loysn skal finnast í ár, leggur hann dent á.

Hann er fullgreiður yvir vegurin kann ikki vera liðugur í ár.

- Men ein loysn skal finnast í ár og spakin skal setast í, tí at bíða til næsta ár verður ikki góðtikið, sigur hann.

- Hetta er eitt mál, sum býráðið tekur heilt alvorligt. Taka landsins politisku myndugleikar ikki í nakkan á sær sjálvum alt fyri eitt, steingja vit vegin og tað hava vit fullan rætt til, sigur Jóhan Christiansen.

# Vegurin fer á landsstýrisfund

**Annika Olsen, landdstýriskvinna er sum lús millum tvær negl. Samgongan vil ikki játta eitt oyra meira 1nn 40 mió. krónur til Leirvíksvegin, men leirvíkingar hava krav upp á endurgjald fyri mista bátahylin**

LEIRVÍKSVEGURIN
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Landsstýriskvinnan Annika Olsen varð kløkk, tá ið hon frætti, at Eysturkommuna ikki er sinnað at leingja loyvið hjá Norðoyatunlinum at brúka vegin frá tunnilsmunnanum til Hagaleitisvegin.

- Eg visti ikki betur enn, at vit vóru í einum dialogi, sigur hon.

Leirvíkingar hava kravt at fáa nýggjan bátahyl aftur fyri bátahylin, sum fer at nýggja ætlaða vegnum. Nýggi bátahylurin er mettur at kosta 10 mió. krónur, og á fundi í januar heitti Annika Olsen á Landsverk um at tosa við Eysturkommunu um at fáa kostnaðin niður.

- Eg havi finguð greið boð frá samgonguni um, at vegurin ikki má kosta meira enn tær játtaðu 40 milliónirnar, og tí kann eg ikki ganga við til at gera ein bátahyl fyri 10 mió. krónur. Men høvdu vit kanska kunna møtst á miðuni, so kostnaðurin bleiv 45 mó. krónur, hevði tað kanska gingið, sigur Annika Olsen.

Hon hevur møguleikan at skera ígjøgnum og bara gera vegin og so gloyma alt um bátahylin. Men tað ber heldur ikki til.

### Ræðist endurgjaldskrav

- Tað gongur ikki, tí gera vit tað, minnir tað um ognartøku, og so kunnu vit vænta at fáa endurgjaldskrav frá kommununi, sigur Annika Olsen.

Hon er farin undir at fyrireika málið at leggja fram á komandi landsstýrisfundi, sum verður mánadagin í næstu viku.

Annika Olsen sverar ikki ítøkiliga, um tað hevði borið til at stongt vegin, soleiðis at eingin ferðsla leppur gjøgnum Norðoyatunnilin. Hon hugsar meira um at finna eina loysn, sum øll kunnu liva við.